# skip og virki samstarva

prísin niður og nú er eisini Unilever farið at seta krøv til burðardyggan fiskiskap.

Leivur Mohr sigur, at skal tað bera til, mugu portiónir og blokkur virkast á stórvirkjum við góðari útgerð.

Samstundis eru keypararnir fáir og teir stýra marknaðinum nokk so nógv.

Tí eru stórar søluavtalur og rávørutrygd ein fortreyt fyri at virka upsa.

Hinvegin hava flakavirkini sum er, ikki ráð at betala meiri enn 3,25 fyri kilo av upsa fyri at fáa tað at mala runt, men skipini skulu hava fýra krónur fyri kilo fyri at tað at bera til.

Verður tosað um saltfisk, er føroyski toskurin góður at salta og hann hevur ein serstakan prís í Suðurevropa.

Hinvegin er ikki nógvur toskur at fáa og útlitini eru ikki tey bestu.

Av tí ísaða fiskinum er ein góður triðingur fluttur óvirkaður av landinum. Tó er stórur áhugi fyri feskum fløkum á marknaðinum í Evropa.

## Góður flutningur er ein fortreyt

Spurningurin er so at leggja so til rættis at fáa hann virkaðan í Føroyum.

Leivur Mohr metti, at ein fortreyt eru góðir flutningsmøguleikar við fráferð minst tvær ferðir um vikuna við óbrotnari køliketu.

Hann sigur, at taka vit fiskavirkini í Suðuroy, liggja fimm av teimum átta virkjunum still í løtuni.

Virkið í Hvalba tók ímóti 3000 tonsum í fjør, men tað liggur still nú. Palm í Vági tók einans ímóti 500 tonsum og tað liggur eisini stilt. Fiskavirking á Tvøroyri tók ímóti 5000 tonsum í fjør og Delta tók ímóti 3000 tonsum. Harafturat tók Jógvan Absalonsen ímóti 300 tonsum í fjør.

Harafturat liggja bæði Føroya Fiskavirking í Vági, Sancy og Roykivirkið í Porkeri, still í løtuni.

Flestu virkini í Suðuroy eru bygd í sjeyti og áttati og vórðu bygd sum vanlig flakavirki ið kundu arbeiða ymisk fiskasløg. Tó vórðu virkini á Tvøroyri og í Hvalba bygd til at virka kongafisk frá djúpvatnstrolarunum og virkið í Vági varð bygt til at arbeiða upsa frá partrolarum.

– Virkini dúvaðu uppá rávøru frá bátum í Suðuroy og virkini og skipini hoyrdu saman.

Men í nítiárunum fóru virkini á húsagang og skip og virki fóru hvør til sítt. Í Vági kom Fiskavirking ikki ígongd aftur og harafturat eru fleiri loyvi seld úr Vági.

Ì dag verða skipini rikin sum ein eind, har tað bara verður hugt eftir, hvat loysir seg best her og nú, men tað er eisini neyðugt fyri at fáa endarnar at røkka saman.

## Neyðugt við fjøltáttaðum virkjum

Leivur Mohr sigur eisini, at skulu virkini kunna taka ímóti fiski frá djúpvatnstrolarunum, sum tað er mest av í Suðuroy, skulu tey verða rættiliga fjøltáttað. Samstundis ger óvissan um rávøruna, at virkini tola ikki nógvar fastar útreiðslur.

Hann sigur, at skal talan vera um stórvirki við nógvri tøkni, krevja tey javna rávørutilgongd t.d. av upsa ella frystari rávøru.

Og so spyr hann eisini um tað er gjørligt hjá skipum og virkjum at finna eitt felags stev, sum hevði verið ein fyrimunur hjá øllum báðum pørtum og vinnuligu menningini í Suðuroy sum heild.

Leivur Mohr vísur eisini á, at aðrastaðni í Føroyum keypa tey smærru virkini frá uppboðssøluni, men tey størri virkini keypa beinleiðis frá skipunum.Eitt nú keypir Kósavirkið frá lokalu línuskipunum og tað sama ger seg galdandi í Vágum, Runavík og í Sandoy.

Men hann vísir eisini á, at hesir partrolarar eru ímillum teir bestu í landinum, so tað ber til at avreiða í Føroyum og fáa góðan prís.

Hann sigur, at skal vánaliga gongdin í flakavinnuni venda, mugu virkini fáa atgongd til rávøru. Somuleiðis má kostnaðarstøðið og lønarlagið ikki hækka, tí kappingin frá láglønarlondum er stór.

Hinvegin mugu virkini eisini hava røttu tøknina eins og dollari og marknaður mugu rætta seg aftur. Flutningskervið má verða nóg gott og vit mugu eisini lúka krøvini frá keyparum um burðardyggan fiskiskap.

Samstundis mugu vit hava ein blanding av virkjum, bæði virkjum, sum kunnu fáa fyrimunir av stórrakstri, men eisini virki, sum skjótt kunnu broytast til skiftandi rávørutilgongd. Møguliga er tað eisini neyðugt, at landið letur stuðul til íløgur og ígongdseting. Samstundis verður tað neyðugt at við vørumenning og at fáa nyttu burturúr hjáframleiðslunum, segði Leivur Mohr.

## Neyðugt við samstarvi

Í Suðuroynni heldur hann, at tað er neyðugt við størri samstarvi ímillum skip og virki og at suðuroyingar sum heild samstarva um at fáa vinnuna á føtur aftur.

Hann hevur skilt, at í fiskapakkanum hjá landsstýrinum fáa skipini eina ávísa landingarskyldu, men tað er eisini neyðugt at bøta um flutningsmøguleikarnar.

Hann vísir eisini á, at fiskigrunnarnir eru beint við Suðuroynna og tí kundi eitt gott tænastustøðið lokka fremmand skip til Suðuroynna.

Harafturat er tørvur á váðafúsum pengum og tað skal vera áhugavert at gera íløgur í Suðuroynni, eitt nú við at bøta um flutningin og tænasturnar. Men tað kann eisini verða umhugsað at gera serlig skattaviðurskifti fyri Suðuroynna, heldur Leivur Mohr.




*Hendan talvan vísur, hvussu stórur partur av fiskinum fer óviðgjørdur av landinum hesi seinastu árini. Teir longu stabbarnir er tað, sum er virkað í Føroyum. Teir stuttu stabbarnir vísir, hvussu nógv fer óviðgjørt av landinum. Tað sæst, at nøgdin, sum fer óviðgjørd av landinum, er vaksin nokk so fitt seinastu árini, samstundis sum fiskiskapurin sum heild er minkaður. Leivur Mohr sigur, at serliga nógv hýsa fer óvirkað av landinum, næstan 60% og talið er nógv hækkað seinastu árini. Av toskinum fer 20% óvirkað av landinum, hetta er minkað eitt lítið sindur seinastu tvey árini, eftir at tað vaks nokk so fitt í 2001*




*Hendan talvan vísur rakstrarúrslitið hjá einum miðalvirki. Sum tað sæst, ganga saltfiskavirkini enn so hampiliga, tað er tann ovara strikan. Men hjá einum vanligum virki er talan um stórt undirskot uppá næstan tríggjar milliónir. Tað er serliga síðani 2003, at tað hevur gingið illa*




*Hendan talvan vísur rakstrarúrslitið hjá trimum týðandi skipabólkum seinastu sjey árini. Tølini vísa tað eru bara línuskipini, sum nú ikki geva hall. Serliga hjá partrolarunum hevur fallið verið stórt. Teir hava havt nøkur góð ár, men enda árið í fjør við einum halli uppá eina millión. Djúpvatnstrolararnir hava eitt hall uppá eina hálva millión. Hjá øllum trimum skipabólkum heur tað gingið illa í fjør*




*Hendan talvan vísur, hvussu fiskiloyvi eru býtt sundur ímillum teir ymsu skipabólkarnar og talvan vísur eisini, hvussu nógv loyvi suðuroyingar hava í hvøjum skipabólki. Somuleiðis sæst, hvussu stóran part av fiskinum hjá einum einstøku skipabólkunum, skipini í Suðuroy fiska og hvussu stórur partur av samlaða fiskiskapinum, tað er. Tað sæst at suðuroyingar hava bara 14 fiskiloyvi av teimum 83, sum eru. Tilsamans fiska suðuroyarskipini 17% av tí, sum fiskað verður*

# Farvæl Helga – vælkomin Niels

NORÐURLANDAHÚSIÐ
*Snorri Brend*

Seinnapartin mánadagin var samkoma hildin í Norðurlandahúsinum í sambandi við stjóraskiftið í húsinum.

Eftir at hava verið stjóri í húsinum seinastu árini var starvstíðin hjá Helgu Hjørvar nú at enda komin. Og í gjár var so fyrsti arbeiðsdagur hjá nýggja stjóranum, tí 52 ára gamla Niels Halm.

Á samkomuni mánadagin fingu fólk høvið at heilsa uppá nýggja stjóran, eins og tey fingu høvið at siga farvæl og takk til Helgu Hjørvar.



*– Hetta er Niels, tann nýggi stjórin! Helga Hjørvar og nýggi stjórin, Niels Halm heilsa uppá Rasmus Joensen í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*